# Hálendsk listakvinna í Smiðjuni

Hósdagin 21. juni letur ein framsýning hjá hálendsku listakvinnuni Mia Koeneman upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini eru 40 málningar við ymiskum myndevnum, sum eisini eru úr Føroyum. Talan er um bæði landslagsmyndir og arkitektoniskar myndir.

Mia Koeneman varð útbúgvin listakvinna í 1979 og hevur egið atelier í Eindhoven, har hon undirvísir listafólkum í vatnlitsmyndum.

Orsøkin til at Mia Koeneman vitjar í Føroyum er tann at hon fyri meira enn 40 árum síðan byrjaði brævaskifti við havnargentuna Bette Johansen, sum seinni fann út av at hálendska nunnan Bernolda, í katólsku kirkjuni í Havn, sum seinni varð nevnd systir Tecla, var fastir Miu. Hetta fekk Bette ikki at vita fyrr enn nøkur ár seinni, tá skipanin hjá nunnunum var broytt. Undir gomlu skipanini høvdu nunnurnar ikki loyvi at siga frá sínum familjusambondum.

Mia Koeneman kom fyrstu ferð til Føroya fyrsta túrin hjá gomlu Norrønu í 1983. Hetta er fjórðu ferð hon er í Føroyum. Hon hevur áður havt framsýning í Smiðjuni.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 27. juni, allar dagar frá kl. 14 til 18.

**mg**



*Mia Koeneman (v.m.) og Bette Johansen hava skrivað saman í yvir 40 ár. Mia hevur í hesum døgum framsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Andlát og jarðarferðir

**Rasmus Johannesen**, ættaður úr Mykinesi, búsitandi í Havn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum týsdagin 19. juni, 82 ára gamal. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 13. Tey, ið ynskja at minnast Rasmus, kunnu lata eina peningagávu til Vesturkirkjuna. Kontur í peningastovnunum.

**Regin Dahl**

andaðist í Keypmannahavn tann 29. mars 2007.

Urnan verður jarðsett í kirkjugarðinum í Havn. Við tað høvið verður hátíðarløta í Havnar kirkju fríggjadagin, tann 22. juni kl. 16.00.

**Kristin, Katrin og Anna Maria**

# Lístaframýning í Hoydølum



*vikuskiftinum hevur listakvinnan Annita Jo málningaframsýning í samkomuhøllini á Studentaskúlanum í Hoydølum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Føroyska listakvinnan Annita Jo hevur í vikuskiftinum listaframsýning í samkomuhøllini í studentaskúlanum í Hoydølum.

Tilsamans 44 málningar verða við á framsýningini.

Síðan 1987 hevur Annita Jo havt tíggju ymiskar framsýningar bæði í Danmark og í Føroyum.

Annita er úr Havn, men býr í Danmark. Hon er útbúgvin lærari og í sínum arbeiði heldur hon m.a. fyrilestrar um stressfyribyrging og persónliga menning. Í løtuni er hon lærari á studentaskúlanum í Hoydølum, har hon undirvísir í donskum og enskum.

Framsýningin verður opin leygardagin 23. og sunnudagin 24. juni frá kl. 14-18.

**Dagurin**

**22. juni. 10.000 blóðvitnismenn.** Allir í eini herdeild hjá keisaranum Hadriani gjørdust kristnir. Eftir miklar pínslur vórðu teir krossfestir á einum fjalli, summi siga á Ararat.

## Rætting

Í gjár skrivaðu vit um Ransin Napoleon Djurhuus í Havn, sum fekk karakterin 10,0 og bronsumedalju fyri sera gott avrik, tá hann gjørdi sítt sveinastykki á Tekniska Skúlanum í Gladsaxe.

Í yvirskriftini komu vit at skriva, at hann fekk silvurmedalju ístaðin fyri bronsumedalju. Vit biðja orsaka mistakið.

**-red.**



Lesið Sosialin